# Bjarni Djurholm hótti arbeiðarafeløgini

**Hann hevur beinleiðis hótt við at skerja verkfalsrættin hjá okkum, skuldi tað hent, at samráðingarnar ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar í vár, enda úrslitaleysar**

VERKFALLSRÆTTUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú samráðingar ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar standa fyri durum, hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum beinleiðis hótt fakfeløgini ið at skerja verkfalsrættin.

Tað eru bæði Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag og Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, púra samd um.

– Hann hevur enntá gjørt okkum greitt, at hetta er eitt mál, sum alt landsstýrið er samt um, leggja tær bæði fakfelagsfólkini afturat.

Fyrr í hesum mánaðinum fingu øll arbeiðarafeløgini fundarboð frá Bjarna Djurholm.

Evnið á fundinum var, hvussu farast skuldi fram í samband við sjúkrarakt djórahald, um tað skuldi hent, at samráðingarnar í vár enda við verkfalli.

Í hesum sambandi varð serliga hugsað um ILA-rakt alibrúk.

– Á fundinum gjørdi Bjarni Djurholm okkum púra greitt, at kunnu arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg ikki semjast um at gera undantak fyri sjúkrurakt djórahald, verður málið lagt fyri løgtingið

– Og hann legði afturat, at tað var eitt samt landsstýrið sum stóð aftanfyri ætlanina at leggja uppskot fyri løgtingið um at skerja verkfalsrættin hjá arbeiðarafeløgunum og sostatt fer



*Bæði Ingeborg Vinther og Hans Joensen uppfataði uppleggið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum sum eina greiða hóttan um at skerja verkfalsrættin, nu samráðingar við arbeiðsgevararnir standa fyri framman*

tað at verða samtykt, siga Hans Joensen og Ingeborg Vinther.

Ingeborg Vinther sigur, at landsstýrismaðurin hevði eisini eitt lógaruppskot við sær, sum hann legði fyri fakfeløgini.

– Hetta er at taka ein part av okkara borgararættindum frá okkum og tað góðtaka vit ikki.

Hon undrast eisini á, at tað skal vera so umráðandi at gera undantøk, tá ið talan er um fisk, men ongin talar um at gera undantøk, tá ið onnur eru í verkfalli, sum hava við livandi menniskju at gera.

Hon leggur dent á, at hetta er ikki sagt, tí at hon heldur, at verkfalsrætturin hjá øðrum fakbólkum eigur at skerjast.

Tvørturímóti leggur hon stóran dent á, at verkfalsrætturin ikki verður rørdur.

– Tað kann ikki koma uppá tal at skerja verkfalsrættin, tí kemur fyrst hol á, leypir skriðan og so fer at verða strongt á at undantøk á fleiri øðrum økjum eisini, ikki bara hjá arbeiðarafeløgum, men hjá fleiri fakbólkum.

### Landssýrið ikki samt

Bæði Ingeborg Vinther og Hans Joensen uppfataðu hetta sum eina greiða hóttan frá landssýrismanninum í vinnumálum um at skerja verkfalsrættin hjá arbeiðarafeløgunum.

Men tey hildu at tað var løgið, at javnaðarflokkurin av øllum skuldi vera við í eini ætlan um at skerja verkfalsrættin.

– Tí boðsendu vit eisini javnaðarflokkinum og tá gjørdi Løgmaður okkum greitt, at javnaðarflokkurin fór ikki at skerja verkfalsrættin.

– Løgmaður vissaði okkum eisini um, at javnaðarflokkurin fer ikki at atkvøða fyri einum uppskoti sum førir við sær, at verkfalsrætturin verður skerdur.

Tað bar ikki til at fáa eina viðmerking frá Bjarna Djurholm.

# Landsstýrið fer ikki at skerja verkfalsrættin

**Tað verður onki lógaruppskot lagt fyri løgtingið, sum hevur til endamáls at skerja verkfalsrættin, staðfestir løgmaður**

VERKFALSRÆTTURIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ein misskiljing, at landsstýrið er samt um, at skerja verkfalsrættin.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.



Hann sigur, at tað kemur ikki uppá tal, at javnaðarflokkurin fer at atkvøða fyri einum lógaruppskoti, sum førir við sær, at verkfalsrætturin fer at verða skerdur.

Hann leggur eisini afturat, at tað fer heldur ikki at koma so langt sum til tað,

*– Landsstýrið tekur ikki undir við at verkfalsrætturin hjá fakfeløgunum verður skerdur. Tað er eitt mál, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum mugu loysa sjálvir, sigur løgmaður*

at eitt lógaruppskot fer at verða lagt fyri tingið, sum fer at fáa avleiðingar fyri verkfalsrættin.

Annars vísur hann á, at spurningurin um støðuna hjá ILA-raktum alibrúkum í sambandi við verkfall, hevur verið umrøddur í fleiri ár.

– Undanfarna samgonga gjørdi eitt lógaruppskot, men tað kom ongantíð í løgtingið og tað fer heldur ikki at verða lagt fram nú.

– Uppskotið er lagt fram á landsstýrisfundi, men tað var ikki undirtøka fyri tí.

Løgmaður sigur, at hetta er eitt mál, sum hoyrir undir arbeiðsmarknaðin at loysa.

– Eg eri samdur við fakfeløgini í, at tað er at gera seg inn á verkfalsrættin at leggja lóg fyri tingið um at avmarka rættindini hjá fakfeløgunum í sambandi við sjúkurakt alibrúk.

Løgmaður sigur, at landsstýrið tvørturímóti samdust um, at landsstýrismaðurin í vinnumálum skuldi heita á feløgini um at gera avtalu um at gera undantak til sjúkurakt djórahald í sambandi við eitt møguligt verkfall. Eitt dømi um eitt slíkt undantak kann vera at tað verður loyst at neyðslakta ILA sjúkan laks, hóast verkfall er.

Løgmaður sigur, at hetta er ein skipan, sum er galdandi í Noregi og hann heldur, at tá ið arbeiðsmarknaðurin har kann finna út av tí, kann arbeiðsmarknaðurin í Føroyum eisini.

Hann væntar eisini, at ein loysn verður funnin, tí báðir partar hava áhuga í at varðveita alibrúkini, tí tað eru eisini arbeiðspláss, sum talan er um.

Hvørki Ingeborg Vinther ella Hans Joensen hava nakað ímóti at tosa við arbeiðsgevararnar um at finna eina semju, skuldi tað komið so langt.

– Samband hevur longu verið ímillum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarnar um hetta mál og semja er um at partarnir seta seg saman fyri at tosa um viðurskiftini, sigur Hans Joensen.

Bæði siga, at tað hevur áður borið til at gera undantøk fyri ILA- rakt alibrúk og tey vænta at tað fer at bera til einaferð afturat.

# Royna alt fyri at fáa semju

**Verkføll hava verið til óbótaligan skaða fyri ILA rakt alibrúk og tað má halda uppat, sigur Bjarni Djurholm**

VERKFALSRÆTTUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er púra misskilt at eg skal hava hótt fakfeløgini við at taka verkfalsrættin frá teimum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at fundurin ímillum hann og arbeiðarafeløgini um at gera undantøk fyri ILA rakt alibrúk, skal ikki uppfatast sum ein hóttan.

–Men tað er rætt at vit taka málið í allar størsta álvara, leggur hann afturat.

Hann sigur, at bæði í 2001 og 2003 førdu verkfall til óbótaligan skaða fyri alivinnuna, tí at tað bar ikki til nóg effektivt at taka neyðslakta ILA rakt alibrúk.

– Nú hava vit fingið nýggjar karmar fyri alivinnuna, men skal hon hava eina framtíð, er tað heilt avgerðandi fyri álitið á alivinnuna, at íleggjarar vita hava vissu fyri, at alivinnan verður rakt so meint av einum verkfalli.

Tí hava vit gjørt eitt lógaruppskot, sum ber í sær, at verður sjúka staðfest í einum alibrúki, ella øðrum djórahaldi, skal tað leggjast fyri eina nevnd við umboðum fyri arbeiðarafeløg, arbeiðsgevarar, har eisini dómarin er í. Tann nevndin skal so gera av, hvørji stig skulu takast.

Bjarni Djurholm ásannar, at landsstýrið vil fyrst royna alt fyri at fáa partarnir á arbeiðsmarknaðinum at semjast og tí hevur hann heitt á partarnar um at tosa saman.

Er tað so ikki rætt, at tú hevur hótt tey ?

– Tað haldi eg ikki, men tað veldst sjálvandi um, hvussu tað verður uppfatað. Tað er í øllum førum greitt, at landsstýrið tekur hetta í størsta álvara, tí tað er púra avgerðandi fyri álitið á alivinnuna, at vit fáa arbeitt skjótt og efektinvt, skuldi sjúka tikið seg upp, eisini hóast tað er verkfall.

Hann sigur, at semjast fakfeløgini og arbeiðsgevarar ikki, verður tað tí neyðugt at taka politisk stig, tí so er ein nýggj støða.

Hvørji tey verða, veit hann ikki nú, men hann váttar at landsstýrið er ikki samt um at leggja málið fyri tingið.

– Men landsstýrið er samt um, at tað er neyðugt at fáa skipað viðurskifti á hesum øki, sigur Bjarni Djurholm.



*Bjarni Djurholm ætlar ikki at taka verkfalsrættin frá fakfeløguum, men hann og alt landsstýrið er samt um, at tað er alneyðugt fyri alivinnuna at fáa skipað viðurskifti, sigur hann*